## Serena vann á Henin

Tað eydnaðist ikki belgisku Justin Henin at fullføra dreymin um ein Australian Open-sigur, nú hon aftur er við í heimselituni. Til tað var amerikanska Serena Williams ov sterk, tá hon leygardagin í finaluni vann 6-4, 3-6, 6-2. Williams sópaði allan iva til viks í triðja setti, tá hon tryggjaði sær fimta sigurin í Australian Open, sum samstundis var hennara tólvta Grand Slam-heiti tilsamans.



## Federer basti Murray

Sveisiski tennisspælarin, Roger Federer, vann í gjár Australian Open-kappingina við sigri á skotska Andy Murray. Federer hevði greitt munin í finaluni, sum hann vann við settunum 6-3, 6- 4, 7-6, so hann nú hevur vunnið australsku kappingina fýra ferðir. Andy Murray hevði møguleikan at gerast fyrsti bretin í 74 ár, sum vann eitt Grand Slam-heiti, men persónligir feilir kostaðu dýrt í finaluni.

### VÍF-Kyndil 20-21 (10-11):

# Spenningur heldur enn spæl

**Kyndil vann ein tepran sigur í klassikaranum móti VÍF. Men talan var sjáldan um stórspæl frá teimum báðum liðunum, sum meira enn øll onnur hava sett sín dám á føroyskan manshondbólt**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk



Intensiteturin var tann vanligi, men leikliga var talan langt ífrá um bestu útgávuna av føroyska hondbóltsklassikaranum, tá VÍF og Kyndil dystaðust sunnudagin

Leikferðin og hugflogið var einki at reypa av, tá tey bæði mest vinnandi liðini í føroyskum manshondbólti tørnaðu saman í Vestmanna sunnudagin.

Enn er støðan tann, at bæði liðini hava møguleika fyri at røkka FM-finaluni móti Neistanum. Men eins nógv er talan um akuttan niðurflytingarvanda hjá liðunum, og kanska var hetta seinasta tað, sum mest eyðkendi spælið sunnudagin.

Tí hetta var sjáldan nakað at reypa av, hóast spenningurin til tíðir var øgiligur.

Sum vant vildi hvørgin parturin geva seg, og kropsliga varð nógv lagt fyri í royndunum at steðga mótstøðuni.

Støðugt var tað tó Kyndil, sum var við yvirlutan. Vestmenningar hingu støðugt í hølunum á teimum grønum, og einstakar ferðir stóð eisini á jøvnum á máltalvuni.

Hvørja ferð megnaði Kyndil tó at svara aftur. Seinastu tveir minuttirnar hevði VÍF tó allar møguleikar, tá teir spældu í yvirtali. Men teir misnýttu møguleikan at minka munin niður í eitt mál, tá brotskast varð misnýtt, og so bilti tað minni, at teir við fáum sekundum eftir minkaðu munin niður í tað eina málið.

Kyndil er við sigrinum aftur á øðrum plássi í kappingini. Longu nú er greitt, at teir skulu spæla steypafinalu móti Neistanum, sum er greitt oddalið. Og so er spurningurin, um tað eisini eydnast at fáa sama dyst til FM-finaluna.

VÍF er hinvegin nú dotti aftur á niðurflytingarpláss. Og tað sigur væl nakað um spentu støðuna í deildini, at VÍF í løtuni er einasta liðið – umframt Neistan – sum hevur positivan málmun. Ikki akkurát tað, sum plagar at eyðkenna ein dumpikandidat.

**FAKTA**

**VÍF-Kyndil 20-21 (10-11)**
**10 min:** 3-3
**20 min:** 6-9
**40 min:** 14-16
**50 min:** 17-19
**Málskjúttar**
**VÍF:** Bjarti Hansen 6, Sámal Jákup Djurhuus 3, Sámal Joensen 2(2), Joen Pauli Høgnesen 2, Agnar Joensen 2, Áki G. Olsen 2, Jákup Suni Andreasen 1, Regin Joensen 1, Sjúrður Poulsen 1
**Kyndil:** Bárður Johannesen 4, Josef Abrahamsen 4, Høgni Klein 4, Hans Áki Dal-Christiasnen 3(2), Tummas Pauli Hanusarson 3, Janus Einar Sørensen 2, Kenn Zachariassen 1
**Brotskøst:** VÍF 5, Kyndil 3
**Útvísingar:** VÍF 5, Kyndil 4
**Dómarar:** Kári Hansen & Sámal Paulason

### H71-StÍF 27-27 (13-15):

# StÍF klóraði sær eitt stig

**Eftir at sera vánaliga byrjan høvdu hoyvíkingar sigurin í pottinum, men teir gloymdu at gera arbeiðið liðugt**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

Við trimum minuttum eftir av dystinum var H71 á odda við tveimum málum. Teir høvdu eisini brotskast, men Esbern Patursson megnaði ikki at umseta hetta til mál móti Marian Cirloganescu, og so kundi StÍF ístaðin vinna síni fyrstu stig í hálvan triðja mánað. Seinastu stigini komu forrestin móti júst H71 í Hoyvíkarhøllini.

Tá var StÍF á kós móti einum finaluplássi ímóti Neistanum. Og hóast teir framvegis eru við í stóra feltinum, sum spælir um finaluplássið, so er niðurlfytingarvandin eisini rímuliga akuttur. Ikki minst, tá hugsað verður um, hvussu tung gongdin hevur verið seinastu nógvu umførini.

Tað var tó lítið at síggja til nakra kreppu fyrstu løtuna av dystinum leygardagin. Strandingar lupu avstað, tá dysturin varð blástur ígongd. Hoyvíkingar hava eisini havt sínar trupulleikar at dragast við seinastu umførini, og tað var ikki líkt til, at nakrir av hesum vóru loysir.

Sum hálvleikurin leið, fekk H71 tó betur fatur á dystinum. Fýra mál á rað syrgdu fyri, at munurin gjørdist millum lítil og eingin. Og hóast StÍF framvegis var á odda, tá steðgurin kom, so var talan nú um víðopnan dyst.

Og góða gongdin hjá heimaliðnum helt fram eftir steðgin. Teir vunnu seg framum, og hóast StÍF fleiri ferðir svaraði aftur, so bendi alt á, at H71 hevði gjørt nóg mikið, tá endin av dysinum nærkaðist.

Men tað gjørdist akkurát ov lítið hjá H71, sum tó við eina stiginum fekk otað seg upp á plássið, sum gevur atgongd til finaluplássið. Men tað er eingin ivi um, at teir iðra seg um, at teir ikki liggja einsamallur á hesum plássinum í dag.

**FAKTA**

**H71-StÍF 27-27 (13-15)**
**10 min:** 3-7
**20 min:** 8-10
**40 min:** 18-18
**50 min:** 24-24
**Málskjúttar**
**H71:** Esbern Patursson 7(1), Janus Sørensen 6, Poul Kjartan Dam 5, Dánjal Tórgarð 3(1), Tróndur Vatnhamar 3, Gunnar Bláberg 1, Freddie Poulsen 1
**StÍF:** Cristian Preda 7, Marius Joensen 6, Bárður Danielsen 5, Borgar Danielsen 2, Sune Erntsson 2, Jógvan Berg 1, Jóannes Prestá 1, Høgni Jensen 1
**Brotskøst:** H71 5
**Útvísingar:** H71 3, StÍF 3
**Dómarar:** Hanus Kúrberg & Hans Thomassen